# Hetta eru garparnir



*Fremst frá vinstru er tað Fróði Samuelsen og við hansara lið Heini Hátún. Aftanfyri hann hava vit Rasmus Eysturoy og við síðuna av honum Herman Eysturoy, og longst til vinstru sonur hansara Absalon Eysturoy*

Teir fimm, sum fríggjadagin kl. 17.47 stóðu ovast á Búgvanum – 188 metrar høgi drangin uttanfyri Ambadal norðan fyri Gjógv – vóru feðgarnir Herman Eysturoy og Absalon Eysturoy. Systkinabarn Absalon, sum er Rasmus Eysturoy og vinmenn teirra Heini Hátún og Fróði Samuelsen.

Í 2005 fóru teir undir at arbeiða seg upp á Búgvan, og í fjør var um reppið tað eydnaðist teimum at koma upp. Í ár gjørdu teir triðju royndina, og tredje gang gjørdist eisini teirra lykkens gang, tí tá eydnaðist umsíðir at vinna allan vegin upp. Við blaðið í gjár segði Absalon Eysturoy, at tað var ein veldig kensla, tá teir umsíðir stóðu ovast á Búgvanum, har fólk ikki hevur verið síðani 1927 – altso 80 ár. Vit prenta her eina mynd av teimum fimm garpunum uppi á Búgvanum, sum ikki kom við í blaðið í gjár, men sum tit nú fáa høvi at síggja.

**-rólant**



Fyrstu fólk á Búgvanum í 80 ár

*Sosialurin skrivaði í gjár um teir fimm garparnar á Búgvanum, og nú prenta vit so eina mynd av teimum, so vit síggja*



*Fimm fegnir mans í bátinum eftir at vera komnir niður av Búgvanum*



*Á veg niðan á 188 metur høga drangin*



*Henda myndin er frá í fjør, tá teir fimm fyri aðru ferð royndu at klatra niðan á Búgvan*